ítróttur

Nr. 65 • Fríggjadagur • 31. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kaupthing stuðlar Helga

**Í morgun skrivaðu Kaupthing og ungi telvarin Helgi Dam Ziska undir stuðulsavtalu, ið er galdandi fyri næstu tvey árini. Við nýggju avtaluni fær Helgi møguleika fyri eitt nú at fáa ein útlendskan venjara hendanvegin**




*Peter Holm, stjóri í Kaupthing, og Andrias Ziska, pápi Helga, heilsast eftir at hava skrivað undir stuðulsavtaluni millum Kaupthing og Helga Dam Ziska. Millum teir báðar situr Helgi sjálvur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

STUÐULSAVTALA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð í føroyskari talvsøgu hevur ein einstakur telvari fingið eina stuðulsavtalu við eina fyritøku. Talan er ikki óvæntað um 15 ára gamla Helga Dam Ziska, ið hesar seinastu mánaðirnar av álvara hevur sligið navn sítt fast í norðurlendska talvheiminum.

### Størsta talentið í føroyskum ítrótti

Á tíðindafundi í Kaupthing bleiv stuðulsavtalan millum Helga Dam Ziska og Kaupthing undirskrivað av Peter Holm, stjóra í Kaupthing og Andrias Ziska, pápa Helga.

– Tað passar ógvuliga væl inn í politikkin hjá okkum at gera eina slíka avtalu við Helga. Vit meta, at hann er størsta talentið í føroyskum ítrótti í løtuni, og hann er ein ógvuliga miðvísur ungur maður, ið satsar upp á sína ítrótt, segði Peter Holm á tíðindafundinum.

Pápi Helga, Andrias, var ógvuliga takksamur vegna Helga, at Kaupthing hevur valt at stuðla soninum.

– Eg vil fegin takka Kaupthing fyri, at teir av sínum eintingum hava tikið hetta stig, sum er ógvuliga óvanligt. Hetta ger tað møguligt hjá Helga at røkka 2.400 stigum í rating og einum IM normi. Sjálvur hevur Helgi sett sær sum mál at gerast stórmeistari, og tað er sjálvsagt altíð gott at hava sett sær høg mál, segði Andrias Ziska.

### Gevur møguleikar

Avtalan millum Kaupthing og Helga Dam Ziska er galdandi næstu tvey árini, og hon umfatar eina fasta upphædd, sum Kaupthing letur Helga árliga, og harafturat er onkur bonusskipan knýtt at avtaluni. Tað merkir, at røkkur Helgi ymiskum málum, gevur hetta nøkur eyka oyru í kassan hjá unga telvaranum.

Helgi Dam Ziska var eisini sjálvur ógvuliga fegin um at hava fingið eina persónliga stuðulsavtalu.

– Við hesi avtaluni havi eg nú fingið nógv størri møguleikar at fara uttanlands at taka lut í altjóða talvkappingum. Eg fari fyrsta dagin av landinum, tí eg skal til EM í Turkalandi, sum er ein ógvuliga hørð kapping, segði Helgi Dam Ziska.

Hann segði eisini, at málið hjá honum í EM-kappingini er at røkka triðja IM-norminum, men at hann ikki gerst vónbrotin, um tað ikki eydnast honum, tí talan er um sera sterka kapping við umleið 130 telvarum.

Bæði Helgi og pápi hansara fegnast um, at ein dreymur, ið nú kann gerast veruleiki við nýggju stuðulsavtaluni, er, at Helgi nú kann fáa ein útlendskan venjara at koma til Føroya at venja hann.

– Tað er sjálvsagt eitt týðandi stig í menningini, og við hesi avtaluni ber tað nú til at fáa ein útlendskan venjara til Føroya í eitt avmarkað tíðarskeið, segði Andrias Ziska.

# Serbi skal royndarvenja við HB

**Sunnudagin kemur ein serbiskur leikari til Føroya at royndarvenja við HB**

ROYNDARVENJING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Talan er um ein 27 ára gamlan miðvallarleikara, ið eitur Panic. Í HB høvdu tey vónað, at serbiski leikarin longu var komin til landið, men so var ikki.

### Sær spennandi út

Steinfinn Mittelstein, stjóri í P/f Havnar Fótbóltur, sigur, at teir í HB hava fingið upptøkur sendandi av serbiska leikaranum, og at hann sær ógvuliga spennandi út.

– Nú bleiv tað ikki til nakað við Milan Kuljic, og tí hyggja vit upp á hendan leikaran. Hann er ein offensivur miðvallari, og vit eru spentir at síggja hann venja við hópinum hjá okkum. Í fyrstu atløgu er talan so um eina royndarvenjing, og so mugu venjararnir báðir taka støðu til, um talan er um ein leikara, ið kann styrkja um hópin, sigur Steinfinn Mittelstein.

Stjórin í Havnar Fótbólti sigur eisini, at viðurskiftini hjá pólverska venjaranum hjá HB, Krzystof Popczynski, enn ikki eru komin upp á pláss. Málið liggur í løtuni í Danmark, har tað verður viðgjørt, og hóast leiðslan í HB fleiri ferðir hevur rykt eftir einum svari, hava teir einki frætt.

## SMS-fjepp

**Annars haldi eg… er heitið á nýggja teiginum í ÍtróttarSosialinum, har fjepparar úr øllum landinum hava møguleika at siga sína hugsan um dystin, sum teir sóu**

SMS
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nú fótbólturin aftur fer á rull, fara vit her á Sosialinum undir fleiri bæði nýggjar og spennandi tættir.

Ein av hesum verður, at vit nú geva tykkum øllum møguleikan at verða partur av tí, sum skrivast skal um ymsu dystirnar í Formula-deildini.

Einasta, sum skrivandi fólkið skal gera, er at senda eini SMS-boð á tlf. 1441. Boðini skulu byrja við orðinum »bolt« og síðani kann skrivast júst tað, sum hugurin og lagið er til í mangan heitu løtunum eftir dystin.

Saman við umrøðuni av einstaka dystinum mánadagin, velja vit her á redaktióni so tær viðmerkingarnar, sum vit á einhvørjan hátt halda vera tær mest beinraknu og kanska eisini stuttligastu. Hartil koma aðrar av viðmerkingunum eisini á sportal.fo. Fyri at halda fast í redaktionellu linjuni á blaðnum, skal navnið á avsendara sendast saman við SMS-boðunum.

Sæð burtur frá vanliga gjaldinum fyri eitt SMS, verður eingin kostnaður av tænastuni fyri brúkaran. Enn eru tað bert telefonir hjá Føroya Tele, sum kunnu senda boð inn á 1441




*Illir, glaðir, stuttligir, kjaftabreiðir ella bara áhugaðir fjepparar hava frá sunnudegnum møguleika at senda inn SMS-viðmerkingar um dystirnar í Formula-deildini*